gult12 cyan12 magenta12 svart12



# Heimsins mest framkomna boriskip bora við Føroyar

**-Vit ætla at halda tað vit hava lovað og sett okkum fyri, nevniliga at bora á landgrunninum í ár sigur Peter Rattey, stjóri hjá BP, sum í næstum skal undirskriva sáttmála við Smedvig um boriskipið West Navion**

OLJULEITING
*Jan Müller*

Tað verður eftir øllum at døma norska boriskipið West Navion, sum fer at bora fyri BP á landgrunninum í heyst. Hetta váttar Peter Rattey, stjóri í BP fyri Sosialinum. Hann hevur júst verið í Føroyum saman við "Føroyabólkinum" hjá BP, ið telur ikki færri enn 35 fólk. Tey hava hildið arbeiðsfundir í Havn, og hava so eisini vitjað skúlar fyri at greiða frá virkseminum hjá BP í Føroyum. Peter Rattey, sum stendur á odda fyri leitingini hjá BP í hesum partinum av heiminum, hevur eisini vitjað í Runavík fyri at síggja umstøðurnar har. Hóast har ikki var so nógv at síggja, so ivast hann onga løtu í, at klárt verður til boringarnar.

Hóast sáttmálin ikki varð undirskrivaður seinnapartin hósdagin, tá vit hittu Peter Rattey, so kann hann við nærum fullari vissu siga, at BP fer at bora í ár og harvið halda seg til tað teir hava lovað.Tað hevur alla tíðina verið ætlanin hjá BP at bora við Føroyar í ár, og tað ætla teir at halda. Tá boripallurin, Jack Bates, sum varð ætlaður at brúka við Føroyar, mátti takast úr hesi ætlanini og setast til at bora víðari á Schiehallionleiðini fyri harvið at kunna økja um framleiðsluna, kom ein ávís óvissa fram um, hvørt BP fór at finna nakran avloysara fyri Jack Bates.

– Vit hava alla tíðina leitað eftir øðrum pallum, og hava so eisini havt eyguni eftir West Navion, sum nú eftir øllum at døma fer at bora Svínoyar-pro - spektið í august. Vit eru eisini ómetaliga glaðir um at kunna brúka hetta sera effektiva og nútímans boriskipið, tí tað gevur fleiri fyrimunir framum ein vanligan boripall. Skipið er sera vælegnað til júst hesa boringina og er tað gjørt út til at lúka norsk krøv og reglur. Tað ger tað eisini lættari fyri føroyskar myndugleikar. West Navion borar í løtuni vestan fyri Írland og skal eftir tað til at bora tveir brunnar vestan fyri Hetland fyri Conoco og BP. Tá hesir brunnar eru boraðir kemur skipið inn í føroyska sjógv og fer til arbeiðis her.



*Sera væl útgjørdar boriskipið West Navion, sum nú eftir øllum at døma fer at bora fyri BP á landgrunninum í august*



*Peter Rattey, sum stendur á odda fyri leitingini hjá BP við Føroyar her saman við Hjarnari Djurhuus, stjóra hjá BP í Føroyum*

*Mynd Jan Müller*

## Framleiða í 2003

Við teimum mongu hentleikum eitt vælútgjørt og nútímans boriskip sum West Navion hevur, kann BP longu móti endanum av september mánað siga, hvønn veg tað ber, um úrslitið er gott ella ikki. Og vísir tað seg, at BP treffir við olju beinanvegin, er ætlanin at taka ein av pallunum, sum verða nýttir í Meksikanska Flógvanum, til Føroya at gera tær víðari boringarnar. Tað merkir, at teir fara at bora tveir framleiðslubrunnar og ein "injector" brunn á sumri 2002. Gongst alt hetta eftir bókini kann BP fara undir fyrstu framleiðsluna frá Svínoyarkelduni longu við ársenda 2003 ella á sumri í 2004. Ætlanin er at hava fulla ferð á framleiðsluni í 2006. Peter Rattey dylur ikki fyri, at BP sær tað sum sína uppgávu – finna teir olju við Føroyar - at fara í gongd við at fyrireika framleiðslu sum skjótast. Teir fara tí at raðfesta menning av eini føroyskari oljukeldu sera høgt. Tað hevur týdning fyri BP at fáa framleiðsluna í gongd skjótast, eins og tað hevur týdning fyri føroyska landskassan at fáa skattapengar inn frá oljuni leggur hann aftrat. (Lesið meira um ætlaninar hjá BP á bretskum og føroyskum øki í næstu viku, blaðm.)



*BP fólk undirvísa sjómansskúlanæmingum*

*Mynd Jens K Vang*

gult13 cyan13 magenta13 svart13

# ítróttur



## Dystir hetta vikuskiftið

1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 06.05 | GÍ-EB/Streymur | Eiler Rasmussen |
| 06.05 | KÍ-HB | Niklas á Líðarenda |
| 06.05 | B68-VB | Petur Hansen |
| 06.05 | FS Vágar-NSÍ | Birgir Sonudm |
| 06.05 | B36-B71 | Lassin Isaksen |

2. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 05.05 | Skála-TB | Jonhard Hansen |
| 05.05 | NSÍ-HB | Páll Augustinussen |
| 05.05 | ÍF-LÍF | Erling Eysturoy |
| 05.05 | GÍ-Sumba | Jógvan A. Jacobsen |
| 05.05 | B36-KÍ | Edvard Højgaard |

3. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 06.05 | GÍ-TB | Dia Lamhauge |
| 06.05 | KÍ-AB | Tummas Pauli Olsen |
| 06.05 | B68-VB | Dan Højgaard |
| 06.05 | ÍF-Royn | Rúni Gaardbo |
| 06.05 | B36-B71 | Tommy O. Joensen |

1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 05.05 | VB-B36 | Poul Erik Jacobsen |
| 05.05 | HB-KÍ | Georg N. Rasmussen |

KÍ-HB:

## Svangir klaksvíkingar

**Meðan HB fekk fulla úrtøku seinast, eru klaksvíkingar longu í vanda fyri at dragna úr oddinum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Eftir ósigurin fyri GÍ seinasta vikuskifti, er einki at siga til, um klaksvíkingar stúra eitt sindur fyri dystinum móti HB. Í fjør var byrjanin upp á kappingarárið út av lagi vánalig, og vandi tykist nú vera fyri, at sama søgan fer at endurtaka seg. Hetta vikuskiftið kemur HB á vitjan, meðan komandi vikuskifti inniheldur útidyst móti føroyameistarunum í Vági.

Tískil eru klaksvíkingar snøgt sagt noyddir at fáa okkurt burtur úr hesum dystinum, og hetta tykjast leikararnir eisini at vera fult greiðir um. Eisini hóast boðini úr Klaksvík eru, at talan verður um eina sera stóra og torføra uppgávu.



*Í fjør fekk KÍ eina ringa byrjan við m.ø. tapi fyri HB, og í ár er vandi fyri, at søgan fer at endurtaka seg*

### Skerdir

Tað verður tó eitt heldur skert KÍ-lið, sum fer á vøllin móti HB. Jan Andreasen fekk reytt kort móti GÍ, og verður tí ikki við til dystin, og harumframt er Símun Waag Høgnesen skaddur í knænum. Onkrir aðrir smáskaðar eru eisini, men í øllum førum er soleiðis lagt upp til tvær broytingar á liðnum. Sannlíkt er, at Atli Danielsen kemur inn í verjuna, meðan tað tykist meira ivasamt, hvør annar leikari kemur inn. Ikki minst verður spennandi at síggja, um rúmd verður fyri Alexander Djordjevid, og alt í alt tykjast fleiri møguleikar at vera fyri, hvussu Tomislav Sivic fer at blanda síni kort.

Hjá HB eru so at siga allir mans tøkir. Allan Mørkøre, sum eisini var smáskaddur undan B68 dystinum, hevur bert runnið hesa vikuna, men verður helst kortini tøkur. Esini hevur Rói Árting runnið hesa vikuna, eftir at hann annars hevur havt trupulleikar við lærkrikanum.

Hóskvøldið eftir venjing fingu vit orðið á Una Arge, sum er »nýggjur« í HB í ár, og spurdu vit hann um, hvørjar vónir hann hevði til dystin.

- Sjálvandi fara vit at royna eftir trimum stigum, men tað verður torført. Teir fingu eina ringa byrjan, og helst vilja teir, at tað skal ganga út yvir okkum, at teir nú skulu reisa seg, segði altso Uni Arge.

B36-B71:

## Trýstið er á heimaliðnum

**Skal B36 gera um seg í oddinum í ár, er neyðugt við einum sigri á B71**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Undan sama dystinum í fjør, var einki at ivast í, at B36 var risa favorittur at vinna heimadystin móti sandoyingum, men úrslitið gjørdist tó eitt heilt annað. B71 vann uppiborið, og hetta var byrjanin til eina størri útreinsan í B36, umframt at teir eisini gjørdust partur í einum trætumáli um eina dómaraavgerð.

### Mugu vinna

Hetta kann verða ein orsøk til, at B36-leikararnir leggja nógv í dystin sunnudagin, men tað er so ikki nakað, sum teir sjálvir nevna. Jákup á Borg heldur í øllum førum, at tað týdningarmesta er at vinna.

- Einki annað enn ein sigur verður góðtikið, so tað er tað einasta, sum telur.

Hann leggur annars afturat, at B36 liðið er eitt sindur skert undan dystinum. Kenneth Jacobsen og Klæmint Matras eru báðir smáskaddir, men roknað verður so við, at í øllum førum Klæmint verður við til dystin. Har umframt er Ronnie Samuelsen enn ikki tøkur til dystin.

### Gamla kenningur

Venjari hjá B71 er Kári Reynheim, sum fyri nøkrum árum síðani var ein av stóru hetjunum hjá B36. Júst hetta tykist tó ikki at nerva Kára, sum annars sigur seg hava allar mans tøkar til dystin.

- Tað verður stuttligt at sleppa at royna seg móti B36. Teir eru so avgjørt millum stóru favorittarnar í ár, so tað er einki at ivast í, at trýstið liggur á teimum.



*Í fjør rapaði korthúsið hjá B36, tá teir taptu dystin móti B71, men teir ætla so onga endurtøku í ár*

Við einum góðum innsatsi kann tó alt henda, og vit ætla so at gera okkara besta, sigur Kári Reynheim at enda.

## KÍ vinnur ikki í Klaksvík

Seinastu fimm árini hevur KÍ ikki vunnið á heimavølli móti HB. Tvær ferðir hevur heimaliðið fingið javnleik, meðan HB í trimum førum er farið suður aftur við teprum sigri.

Annars er áhugavert at síggja, at tað at kalla altíð hevur verið sera javnt, tá VB vitjar á Toftum, meðan áskoð-ararnir kunnu vænta sær eitt sindur av hvørjum í Havn, har B36 hevur havt misjøvn úrslit móti B71, men har teir báðir heimasigrarnir hava verið stórir.

Myndin sýnir, hvussu tað hevur gingist seinastu fimm árini, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava dystast.

| | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| GÍ-EB/S | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |
| KÍ-HB | 1-2 | 0-0 | 2-2 | 0-2 | 0-1 | 0-2-3 | 3-7 |
| B68-VB | 1-2 | 0-0 | 2-1 | 0-1 | 3-1 | 2-1-2 | 6-5 |
| FSV-NSÍ | 3-3 | - | - | 1-3 | - | 0-1-1 | 4-6 |
| B36-B71 | 2-4 | 6-1 | - | 6-1 | 2-2 | 2-1-1 | 16-8 |